Top Gear:

# Clarkson ópopulerur í Maleisia



*Jeremy Clarkson er ikki populerur í Maleisia eftir at hann hevur sprongt ein maleisiskan bil í luftina*

**Tað at BBC-journalisturin Jeremy Clarkson sprongdi ein maleisiskan bil í luftina hevur ført til vreiði í landinum og til drúgt orðaskifti í meileisiska parlamentinum**

BILAR

Í Maleisia eru fólk í øðini inn á BBC-journalistin Jeremy Clarkson, sum í bilprogramminum "Top Gear" hevur kosið maleisiska bilin Perodua Kelisa til heimsins vánaligasta bil.

Fyri at undirstrika hvussu vánaligan hann helt bilin vera, gjørdi hann seg rættuliga inn á bilin við at sparka og sláa hann, áðrenn hann hivaði bilin upp í einum krana og sprongdi hann í luftina.

**mg.**

# Gamal Saab við kampingvogni



Nakað fyri páskir stóð hesin Saab 93 frá umleið 1960/61 á eystaru bryggju við Farstøðina í Havn. Hann var komin við Norrønu.

Bilurin hevði svenskar nummarplátur og hevði ein minst líka gamlan kampingvogn upp á sleip. Sum skilst eru bilurin og vognurin farin til Íslands. Um onkur har hevur keypt bilin og vognin við renovering fyri eygað, vita vit ikki.

Har er alt við. Bilurin hevur kampingspegl sett á originalu speglini, og kampingvognurin hevði sjónvarpsantennu á takinum.

10. juni í ár eru 60 ár liðin, síðan Saab í Svøríki almannkungjørdu, at teir fóru undir at framleiða bilar. Teir høvdu gjørt ein prototypu í 1946. Tað var Saab 92001 ella Ursaab, sum hann eisini verður nevndur. Saab var annars ein verksmiðja sum gjørdi flogfør. Navnið Saab stendur fyri "Svenska Aeroplan Aktiebolaget".

**mg.**



# Fyrstu kinesisku MG

**Við tónum frá symfoniorkestrinum í Birmingham og myndum av Buckingham Palace presenteraðu kinesarar sínar fyrstu MG-bilar, síðan teir keyptu bretsku MG-Rover verksmiðjuna**

BILAR

Kinesarar hava gjørt sínar fyrstu MG-bilar, síðan Nanjing Automobile keyptu bretsku MG-Rover verksmiðjuna í 2005.

Upp á seks mánaðar hava teir bygt ein stóra verksmiðju og sett robottar og samlibond, sum teir keyptu úr Onglandi, upp har. Teir rokna við at framleiða 200.000 nýggjar MG-bilar um árið, og eftir ætlan skulu teir seljast um allan heimin, skrivar BBC News.

Tá Nanjing Auto presenteraðu sínar fyrstu bilar: MG7 Salon og sportvognin MG-TF, hoyrdust tónarnir frá symfoniorkestrinum í Birmingham og á einum stórskíggja vístu teir myndir av Buckingham Palace, so eingin skuldi ivast í, at talan var um teir "ordiligu" MG-bilarnar.

**mg.**




